# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Gásarungi søkti Liverpool



*Fagnaðurin var ovurstórur, tá Dan Gosling hevði kínt bóltinum út um Reina og inn um handara stólpan. Gosling merkir gásarungi*

Mynd:Polfoto/AP

**Bert 19 ára gamli Dan Gosling gjørdist stóra hetjan í bláa partinum av Liverpool, tá hann eftir 118 minuttum skeyt avgerandi málið í FA-cup-uppgerðini millum Everton og Liverpool**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Illveðrið hevur argað fólk í Onglandi seinastu dagarnar, og tað gjørdi tað eisini í gjárkvøldið.

Tað vóru nevnliga ikki allir hyggjarar hjá ITV, sum sóu einsamalla málið á Goodison Park hjá Everton í gjárkvøldið. Men sóu tey tað, so er lítil ivi um, at málskjúttin prýðir baksíðurnar á flestu ensku bløðunum í dag.

### Ókend hetja

Undan triðja seinasta minuttinum í gjár vóru nevnliga ikki serliga nógv, sum kendust við navnið á Dan Gosling. 19 ára gamli miðvallarin, sum eisini kann spæla í verjuni, skrivaði undir sáttmála við Everton í fjør, eftir at hann longu sum 16 ára gamal hevði bitið seg fastan á liðið hjá Plymouth Argyle. Eitt avrik, sum eisini bar royndarvenjing hjá Chelsea og pláss í enska U17-hópinum til EM-endaspælið við sær.

Talan hevur tó fyrst og fremst verið um lærutíð í Everton. Síðani hann skrivaði undir sáttmála við felagið fyri 13 mánaðum síðani, hevur tilveran fyri tað allar mesta verið á eykaliðnum hjá bláa felagnum úr Liverpool.

Soleiðis var dysturin í gjár bert tann næsti, har David Moyes sendi hann á vøllin fyri besta liðið. Íroknað umdystinum, sum gjørdist neyðugur, gjørdist talan hesa ferð um 68 minuttir á vøllinum, og eftir 65 av hesum syrgdi Gosling altso fyri at skriva sítt navn í lokalu søgubøkurnar.

Møguleikin tóktist annars vera burtur, tá Gosling ikki heilt fekk tamarhald á innleggi frá van der Meyde úr høgru. Men tvey stutt trekk skaptu eitt lítið hol at skjóta ígjøgnum, og so varð bólturin kíndur út um Manuel Reina og móti innaru síðuni av stólpanum.

### Mistu Gerrard

Undan hesum hevði talan leingi verið um trýst frá vertunum. Liverpool misti Steven Gerrard eftir fyrsta góða korterið, tá hann noyddist av vøllinum við vøddaskaða, og eftir fimm korterum fekk Lucas reytt kort frá dómaranum.

Everton hevði eisini fleiri vandamiklar royndir í umdystinum, men leingi bendi alt altso á, at bortsspørk skuldu til, áðrenn mótstøðuliðið hjá Aston Villa í fimta umfarinum kundi finnast.

## FAKTA

**Umdystir 4. umfar**

**3. februar**

| | |
|---|---|
| Burnley-WBA | 3-1 |

4. februar

| | |
|---|---|
| Nottingham Forest-Derby | 2-3 |
| Aston Villa-Doncaster | 3-1 |
| Blackburn-Sunderland | 2-1 |
| Everton-Liverpool | 1-0 |

**5. umfar**

**14. februar**

Swansea-Fulham
Blackburn-Coventry
Sheffeild Utf-Hull
West Ham-Middlesbrough
Watford-Chelsea

**15. februar**

Everton-Aston Villa
Derby-Manchester Utd

**16. februar**

Arsenal-Cardiff

# Leikbannið hjá Lampard strikað

**Chelsea fekk viðhald frá enska Fótbóltssambandinum, tá felagið kærdi útvísingina hjá Frank Lampard í dystinum móti Liverpool**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var kanska avgerandi løtan í dystinum á Anfield Road sunnudagin, tá Frank Lampard varð rikin av vølli fyri tackling móti Xabi Alonso hjá Liverpool.

Chelsea tapti at enda dystin 2-0, og eftir dystin var Luiz Felipe Scolari, venjari hjá Chelsea, skjótur at staðfesta, at útvísingin av Lampard var burturvið.

Beinleiðis reytt kort gevur vanliga tríggjar daga leikbann í ensku kappingini, men enska Fótbóltssambandið hevur nú givið Chelsea viðhald í, at Frank Lampard ikki skuldi fingið reytt kort, og at leikbannið tí verður strikað.

Hetta broytir tó ikki úrslitið, sum ber við sær, at Chelsea framvegis er átta stig aftan fyri oddaliðið, Manchester United.



*Mike Riley skuldi ikki givið Frank Lampard reytt kort sunnudagin*

# FCA strikar tveir sáttmálar

Thomas Høegh og Kasper Kalule eru ikki longur partur av hópinum hjá FC Amager

Felagið hjá Toda Jónsson og øðrum boðaði týsdagin frá, at teir hava fríttstilla teir báðar spælararnar, sum als ikki tóktust hava møguleika at koma á besta liðið hjá felagnum.

Báðir spælararnir siga við bold.dk, at fyri teirra viðkomandi var hetta helst skilabesta loysnin, soleiðis at teir kunnu leita sær betri møguleika fyri spælitíð í